# BÓKASÍÐAN

*bøkur, bøkur, bøkur…*



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Stilla gentan gevur ljóð




Tað er líka við at ein fer at halda, at tað hvílir eitt forbannilsi yvir bøkurnar hjá Peter Høeg. Omaná vánaligu ummælini av *Den stille pige*, fúka ákærurnar um eina fjalda dagskrá nú um oyruni á høvundanum.

Nýggja skaldsøgan hjá Høeg er nevniliga fjald reklama fyri nýreligiøsu sektina kring Vækstcenteret, har rithøvundurin hevur sína dagligu gongd, vil ein fyrrverandi limur í sektini, Annette Leleur vera við. Sambært henni er tað ongin ivi um, at høuðspersónurin í bókini er ein lýsing av stovnaranum og leiðararnum á Vækstcenteret, Jes Bertelsen.

Fyri at gera tað heila enn meir litríkt, er ein kvinna nú traðkað fram, sum sigur seg vera tann stilla gentan, Høeg byggir sína søgu á. Kvinnan vaks upp á Vækstcenteret, har leiðarin plagdi at kalla hana sína "andligu dóttir". Sambært kvinnuni minnir sambandið teirra millum illgrunasamt nógv um tað, sum fer fram ímillum høvuðspersónin og ta stillu gentuna í bókini hjá Høeg. Um orsøkina til at hon traðkar fram, sigur hon, at hon vil ávara ímóti at lata børn vaksa upp eitt slíkt stað, tí tað skaðar teirra samleikamenning. Tað ber illa til at sameina tað at leita djúpt inn í seg sjálvan andliga við tað at vera foreldur, sigur kvinnan, sum sjálv mest sum varð slept uppá fjall av sínum foreldrum, meðan tey búðu Vækstcenteret.

Peter Høeg hevur enn ikki gjørt viðmerkingar í málinum.

# Bøkurnar og eg

**Ben Arabo, stjóri fyri Amerada Hess í Føroyum**

*Hvat lesur tú í løtuni?*
– Eg lesi nógv. Eg ferðist í arbeiðsørindum fleiri ferðir um mánaðan, og brúki nógvar tímar í flogførum og á flogvøllum, so eg syrgi altíð fyri at hava okkurt at lesa við hondina.

– Eg eri júst byrjaður uppá bókina *Auschwitz, The Nazis & the Final Solution* eftir Laurence Rees. Bókin er útgivin av BBC books og varð útrópt "History Book of the Year" við British Book Awards 2006. Eg havi altíð havt stóran áhuga fyri søgu og á leið onnurhvør bók, eg lesi, er um søgu ella ein ævisøga. Man kann læra nógv av søguni, og eg haldi, at man er illa rustaður at møta framtíðini, um man ikki er tilvitaður um fortíðina.

– Tað er eisini ein sonn fragd at fáa okkurt nýtt at vita um fortíðina, sum man ikki visti frammanundan. Tey flestu munnu kenna Hudson River í New York og Hudson Bay í Canada, men tey fægstu munnu vita, at Henry Hudson tann 30. mai 1609 tók proviant og vatn í Føroyum á veg á rannsóknarferð, ið skuldi finna norðurvestur farleiðina. Hesa upplýsning datt eg yvir í frálíku bókini *Nathaniel's Nutmeg* eftir Giles Milton um kryddaríhandilin í Fjareystri. Bókin visti eisini at siga, at Henry Hudson hevði fleiri ferðir verið í Føroyum áðrenn túrin í 1609.

*Er tað onkur bók, tú minnist serliga væl?*
– George Orwell er eftir mínum tykki ein tann besti rithøvundurin nakrantíð. Ikki bara hansara best kendu bøkur *Animal Farm* og *1984* hava gjørt stórt inntrykk á meg, men eisini tær eitt sindur minni kendu sum *Burmese Days* og *Coming up for Air*. Málburðurin er lættur, og tað er ein sonn fragd at lesa bøkurnar hjá honum, sum altíð hava ein nokkso markantan boðskap. *Brave New World* hjá Aldous Huxley man eisini hoyra til ein av mínum favorittum.

– Ein tann besta bókin innan søgu, ið eg havi lisið, og ein tann besta bókin yvirhøvur, er *In the Heart of the Sea* hjá Nathaniel Philbrick. Hetta er sanna søgan um ein hvalabát úr Nantucket USA, sum verður sokkin í Stillahavinum av einum augusti í 1820. Søgan hjá teimum, sum yvirlivdu hesa hending inspireraði Herman Melville til at skriva *Moby Dick*, sum forrestin burdi verið obligatoriskur lesnaður hjá øllum skúlaungdómi.

– Annars dámar væl humoristiskan lesnað. Bøkurnar hjá Ben Elton – m.a. kendur sum teksthøvundur á Blackadder sjónvarpsrøðini – eru frálíkar. Flashman røðin, skrivað av George Macdonald Fraser, um Victorianska antihetjuna, officerin Harry Flashman, sum hevur muruna á einum slaktarahundi og dirvið hjá eini haru, stendur eisini høgt í metum há mær.

*Hvør var tín fyrsta lesiuppliving?*
– Eg lærdi meg at lesa við Anders And, men fyrstu veruligu barnabøkur, ið eg minnist at hava lisið, vóru *Emil úr Lønnebergi* og harafturat Nils Holgarsson, sum lærarin hjá mær í fyrsta flokki gav mær at lesa. Eg helt so áfram til bøkur sum *Gummitarzan*, *De 5 bøkurnar*, fyri síðani sum tannáringur at pløja meg ígjøgnum allar Stephen King bøkurnar. Tað var tá, eg byrjaði at lesa á enskum.

*Hvørja bók vildi tú ynskt, tú hevði lisið?*
– *Diplomacy* hjá Henry Kissinger. Eg keypti henda múrsteinin fyri nøkrum árum síðani, men hon er ikki komin longur enn til at síggja imponerandi út í bókareolini hjá mær. Í ár skal tað verða!

*Hvat fær teg at velja tær bøkur, tú lesur?*
– Onkrar keypi eg eftir viðmæli frá vinfólki, ið vita, hvat mær dámar, men tann besti mátin hjá mær er at fara inn í ein bókhandil og ganga og mala og keypa tær bøkur, ið fella mær inn at keypa. Nú eri eg so heppin, at eg ofta havi høvi til at støkka inn



*– Tað góða við lesnaði er, at júst tá man heldur seg hava funnið bestu bók nakrantíð, so kemur man altíð fram á eina aðra, sum gevur tí fyrru skarpan gang, heldur Ben Arabo*

## Meistaraverk um "Meistaran"



*Colm Tóibín*

Í farnu viku fekk írski rithøvundurin Colm Tóibín heimsins størstu bókmentavirðisløn fyri skaldsøguna *The Master* um mæta amerikanska høvundan Henry James.

Tað krevur sín høvund at kasta seg út at skriva bøkur um heimsins mætastu høvundar. At royndin hartil vann Tóibín IMPAC bókmentavirðislønina á 100.000 euro sigur ikki so lítið. Ummælarar eru eisini á einum máli um, at bókin um James ella meistaran, sum hann ofta varð kallaður, er eitt meistaraverk í sær sjálvum.

Bókin byrjar í 1895 við vónleyst miseydnaðu royndini hjá James sum sjónleikahøvundur, og endar beint áðrenn hann rakk hægstu tindar sum rithøvundur í 1899. At Tóibín hevur valt júst hetta tíðarskeiðið kemst av tí innara drama, sum eftir hansara tykki eyðkendi lyndið hjá James. Henry James var í allar mátar ein sera privatur persónur. Hann vildi fyri alt í verðini ikki viðganga, hvussu vónbrotin hann var av síni fyrstu roynd sum høvudur, ella at hann var samkyndur, sum tey flestu gittu. Tað er heldur ikki avdúkingin sum er umráðandi fyri Tóibín. Heldur brúkar hann óvissuna at løða søguna við týdningum og undirtýdningum, og letur restina vera upp til lesaran.

*The Master* er ikki ein vanlig skaldslig ævisøga, men ein skaldsøga, sum skapar sítt huglag við at lýsa tankar, samrøður og inntrykk, sum á ongan hátt kunnu skjalprógvast. Soleiðis verður bókin eisini ein hugtakandi mynd av, hvussu lív verður sáldað,

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Vit gera bøkur frá uppseting til liðugtgerð. Við drúgvastu royndunum innan bókaprent er tín bók í góðum hondum hjá okkum
Føroyaprent
tel. 314 555, www.foroyaprent.fo